# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## John P. Vilhelm givin hjá Auto Service

31. desember 2009 var seinasti starvsdagur hjá John P. Vilhelm á bilasøluni Auto Service.

John er ímyndin av Saab í Føroyum.

John, sum í dag er 65 ára gamal, lærdi til bilmekanikara hjá P/F Vilhelm Nielsen og er eisini útbúgvin maskinmeistari. Eftir at hava siglt í nøkur ár við skipum hjá Kosangass, fór hann at arbeiða hjá Tummasi Ørv í 1976. Tummas Ørv helt til yviri við Strond og seldi m.a. skipsmotorar og Saab bilar. Fyritøkan seldi eisini eitt skifti italsku Lancia og sponsku Seat bilarnar. Tá Tummas doyr í mai í 1994, tók John yvir, og fyritøkan skifti navn til Sp/f John P. Vilhelm.

Í 2001 keypir P/F Meinhardt Arge umboðið fyri Saab bilarnar, og John og hansara starvsfólk fóru síðan at arbeiða hjá P/F Meinhardt Arge, sum seinni skifti navn til Auto Service.

*Kelda: www.autoservice.fo*



*Árni Rasmussen, stjóri í Auto Service (v.m.), og John P. Vilhelm, sum hevur selt Saab síðan 1976*

Fyri 25 árum síðan:

## Bankarán í Kollafirði

Leygardagin 12. januar 1985 skrivar Sosialurin um eitt bankarán í deildini hjá Føroya Banka í Kollafirði hósdagin 10. januar, har ránsmenninir tóku millum hundrað og tveyhundrað túsund krónur við sær.

Blaðið skrivar, at øll starvsfólkini í bankanum vóru til arbeiðis dagin eftir, hóast tey høvdu fingið ein skelk. Bilurin, sum bankaránararnir koyrdu í, varð funnin við Leynavatn 40 minuttir eftir ránið. Ein húgva, sum ein av ránsmonnunum hevði brúkt, var eisini funnin nærhendis bilinum.

*Kelda: Sosialurin leygardagin 12. januar 1985*



*Húgvan, sum ein av ránsmonnunum hevði brúkt, var funnin nærhendis bilinum*



Nr. 5 — 12. januar 1985 Sosialurin Síða 5

*Føroya banki í Kollafirði:*

**Øll vóru til arbeiðis í gjár**

*— Men vit eru skelkað og ikki so væl uppløgd, segði deildarleiðarin*

Øll starvsfólkini í deildini hjá Føroya Banka í Kollafirði vóru til arbeiðis í gjár, og deildin var opin sum vant.

Eitt starvsfólk var heima fyrrapartin, men kom til arbeiðis aftaná døgurða.

Niclas Joensen, deildarleiðari, segði í gjár, at tey vóru enn eitt sindur skelkað og var arbeiðsdagurin ørvísi enn aðrir. Viðskiftafólkini vóru nakunlunda tey somu í tali sum ein vanliga fríggjadag.

Starvsfólkini sluppu ikki til hús hóskvøldið fyrr enn klokkan tiggju. Tá var liðugt at telja upp og stjolnar eru millum 100 og 200.000 kr. úr pengaskuffuni. Niclas Joensen vil ikki upplýsa nágreiniliga talið, men tað liggur ...

200.000 enn 100.000., sigur hann. Pengarnir vóru tryggjaðir.

Niclas sigur, at tey meta ránsmenninar vera ungar, tí teir høvdu kvika medferð. Báðir vóru høgir, annar umleið 190 cm og hin millum 180 og 185 cm. Báðir vóru klænir.

hd

Ein kriminalpolitistur leitar eftir fingramerkjum á bilinum, sum varð funnin við Leynavatn 40 minuttir eftir ránið í Kollafirði.

Føroya Banki í Kollafirði liggur fyri seg sjálvan (í ringinum). Ránsmenninir fóru norður eftir bygdarvegnum á miðjari myndini og út á landsvegin við kirkjuna.

*1985 — Altjóða ungdómsár:*

†

### Andlát og jarðarferðir

**Knud Erik Andersen, Toftir,** andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 74 ára gamal.

**Hans Anton Thomsen, ættaður av Strondum, búsitandi í Saltangará**, andaðist týsdagin á Ríkissjúkrahúsinum, 49 ára gamal. Kistan kemur við flogfarinum hósdagin kl. 14 og í Glyvra kirkju umleið kl. 15.30. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, sum ynskja at senda blómur ella krans, kunna ístaðin lata eina gávu til børnini. Konta í Eik.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara góði pápi, abbi, langabbi og verpápi

**Andrias Nielsen**
Sandavági

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkini á Sýnini. Tøkk til David Johannesen, prest, fyri góð og troystarrík orð. Tøkk fyri blómur, kransar og tøkk fyri gávur til Sandavágs kirkju. Tøkk øll tit, sum hjálptu til við jarðarferðini, og tøkk øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ninna, Tóra og Jóanis**

## Merkisdagar

**70 ára føðingardagur**
Hósdagin 14. januar verður Jafet Rasmussen í Søldarfirði 70 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Diamantbrúdleyp**
Tann 28. januar kunnu hjúnini Diana og Alfred Klein, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 30. januar, kl. 16, har øll eru vælkomin. Fólk verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 23. januar á tlf. 444092.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. februar hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. februar frá klokkan 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. jan kl. 13 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Jóhanna Dahl Sørensen Norðdepil og Rasmus Magnusson Innan Glyvur. Eftir vígsluna verður reception á Klaksvíkar Sjómansskúla frá kl 14-17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum í Árnafirði kl. 19.

**Dagurin**
**14. januar. Felix**, deyður umleið ár 260. Prestur í Nola, nærhendis Napoli í Italia. Nógvar eru frásagnirnar um hansara lítillátna lív og tær mongu undirgerðirnar hann útinti. Navnið merkir eydnuríkur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*